# Frágreiðing um viðurskiftini við Russland

**Kapittul 1: Inngangur** ... 3
Tjóðaráhugamál sum grundarlag fyri uttanríkispolitikki ... 3
Bygnaður ... 3
Eitt heimspolitisk vegamót ... 4
**Kapittul 2: Russland sum samstarvspartur í viðkomandi millumtjóða høpi** ... 5
Luttøka hjá Russlandi í veiðufelagsskapum, strandarlandasamráðingum og Arktiska ráðnum ... 5
Fiskiveiðuavtalur, sum Russland hevur við onnur lond ... 6
Ágóðar við fiskivinnusemju í millumtjóða samstarvi ... 7
Samandráttur um viðkomandi millumtjóða samstarv, sum Russland luttekur í ... 7
**Kapittul 3: Havnaatgongd** ... 7
Týdningurin av føroyskum havnum fyri russisk fiskiskip ... 8
Týdningurin fyri Føroyar av russiskum virksemi í føroyskum havnum ... 9
[redacted]
**Kapittul 4: Økt eftirlit við virkseminum hjá russiskum skipum** ... 14
Havnaeftirlit ... 15
Tjekkpunkt ... 15
Eygleiðarar umborð á fiskiskip ... 16
Serøkið ... 17
Tolleftirlit ... 18
Samandráttur um eftirlit og Serøkið ... 18
[redacted]

[redacted]

**Kapittul 7: Avleiðingar fyri burðardygga umsiting av tilfeinginum og fyri atgongdina til rávøru** ....... 27
Avleiðingar fyri møguleikarnar frameftir at tryggja eina burðardygga umsiting av tilfeingi í Norðurhøvum ........ 27
Avleiðingar fyri atgongdina til rávøru hjá fiskavirkjum á landi ........ 28
Samandráttur um aðrar avleiðingar ........ 29
[redacted]
Tiltøk sum aftursvar upp á altjóðarættarlig brot ........ 30
Fleiri avmarkandi tiltøk setast í verk ........ 31
[redacted]
**Kapittul 9: Samhandil við Russland síðan februar 2022** ........ 32
Gongdin í samhandlinum millum Russland og onnur lond ........ 32
Samhandilin millum Føroyar og Russland ........ 33
Samandráttur um samhandilin við Russland síðani februar 2022 ........ 35
**Kapittul 10: Viðurskiftini við onnur lond í mun til samstarvið við Russland** ........ 35
Samandráttur um viðurskiftini við onnur lond í mun til samstarvið við Russland ........ 37
**Kapittul 11: Stuðul til Ukraina** ........ 37
Samandráttur um stuðul til Ukraina ........ 38
**Kapittul 12: Váðin fyri njósning** ........ 38
Samanumtøka um váðan fyri njósning ........ 39
**Samandráttur** ........ 40

Lutvíst innlit í:

## *Frágreiðing um viðurskiftini við Russland*

## Kapittul 1: Inngangur

**Tjóðaráhugamál sum grundarlag fyri uttanríkispolitikki**

Tjóðaráhugamál eiga at vera grundarlagið undir avgerðum, sum snúgva seg um ella viðvíkja uttanríkispolitikki. Tjóðaráhugamál eru tongd at málum, tørvum, ætlanum og virðum, sum lond virka fyri í sínum millumtjóða viðurskiftum. Sum útgangsstøði fevna tjóðaráhugamál tí um tær politisku hugsjónir, sum eitt land leggur til grund fyri sínum uttanríkispolitikki, og tey egináhugamál mótvegis øðrum londum og millumtjóða felagsskapum, sum hava týdning fyri at skipa eitt trygt samfelag við góðari vælferð, sum áhaldandi kann mennast. Uttanríkispolitikkur endurspeglar sostatt í ávísan mun innanríkispolitiskar raðfestingar, men samstundis er tað, sum fyriferst á heimspolitiska pallinum, og sum triðjalond mangan hava lítla ávirkan á, ein fortreyt, ið ger, at lond stundum mugu meta um og viga fyrimunir og vansar við ávísum uttanríkispolitiskum áhugamálum (Brot)

...

Frágreiðingin inniheldur ikki tilmæli ella uppskot um raðfestingar, men metingar um møgulig stig, tilhoyrandi avleiðingar og neyðugar tillagingar (brot)

...

Í oktober 2022 varð frágreiðingin "Russlandssáttmálin – Hvat er búskaparligi kostnaðurin/virðið" latin landsstýrinum. Greiningin varð gjørd sum partur av einum grundarlagi fyri at taka avgerð um framtíðar fiskivinnusamstarv við Russland, og er løgd við sum sjálvstøðugt fylgiskjal til hesa frágreiðing. Í fyriliggjandi frágreiðing verða tí ikki gjørdar nýggjar metingar av búskaparligu avleiðingunum. (brot)

**Bygnaður**

...

**Eitt heimspolitisk vegamót**

Í løtuni henda stórar rembingar á heimspolitiska pallinum. Síðan Kalda kríggið endaði fyri góðum tretivu árum síðan hevur USA havt støðu sum einsamalt risaveldi, ið hevur sett dagsskránna í altjóða viðurskiftum og í stóran mun stýrt trygdarpolitisku gongdini. Dentur hevur verið á altjóðagerð, demokratisering, búskaparliga samanrenning, víðfevnt álitisfremjandi samstarv, sínámillum handil og opinleika. Men seinnu árini er komið til sjónar, at serliga Russland og Kina vilja bjóða einpólaðu valdsstøðuni hjá USA av til tess at fáa eina aðra heimspolitiska valdsjavnvág.

Gongdin í hesum londum er seinastu árini hend á einum ódemokratiskum grundarlagi, sum stendur í andsøgn við tey virði, sum vesturlendsk fólkaræði byggja á. Hesin munur setir í størri mun enn áður dám á

uttanríkispolitikk. Tað ber í sær, at heimspolitikkur nú er á veg inn í eitt nýtt tíðarskeið, har kapping millum stórveldi og geopolitikkur aftur eru vorðin ein snúgningsásur.

Mong hava skilmarkað ólógligu innlimanina av Krim í Russland í 2014 sum eitt vegamót, har eitt nýtt tíðarskeið tók skap, og innrásina í Ukraina í fjør sum staðfesting um, at eitt nýtt tíðarskeið við eini broyttan heimsskipan er byrjað (brot)

...

Samstundis er heimurin meira samanrunnin búskaparliga, tøkniliga og mentanarliga enn nakrantíð fyrr. Sum heild hava Føroyar – eins og lond flest um okkara leiðir – notið gott av fleiri áratíggjum við altjóðagerð og opnum heimshandli. Ein meira fragmenterað heimsskipan kann ávirka møguleikarnar fyri handli og samstørvum á summum eymum økjum (brot)

...

## Kapittul 2: Russland sum samstarvspartur í viðkomandi millumtjóða høpi

**Luttøka hjá Russlandi í veiðufelagsskapum, strandarlandasamráðingum og Arktiska ráðnum**

Russland luttekur í fleirliðaðum fiskiveiðusamstarvi á fleiri økjum. Í summum førum luttekur Russland í stóran mun sum undan innrásini, meðan tað í øðrum førum er talan um avmarkaða luttøku.

Havast skal í huga, at lond í summum førum eru bundin at samstarva um umsiting av havtilfeingi sambært havrættarsáttmálanum, og at umstøðurnar viðvíkjandi fleirliðaðum samstarvi tí ikki eru heilt sambæriligar við tvíliðað fiskiveiðusamstarv. (brot)

...

Í ICES høpi hevur arbeiðið verið tarnað síðani russisku innrásina í Ukraina. Fyrst varð alt fundarvirksemi fyribils útsett, og 30. mars 2022 varð endaliga avgjørt at suspendera alla russiska luttøku í ICES. Russland hevur formansskapin í Arktiska Ráðnum til 11. mai í ár, men formliga hevur einki samstarv verið síðan februar í 2022. Russland er sostatt framvegis limur í Arktiska ráðnum, og tá ið Noreg tekur við formansskapinum í næstum, verður málið at gera Arktiska ráðið so virkisført sum til ber við støði í Ottawa-yvirlýsingini og Rules of Procedure fyri ráðið. (brot)

**Ágóðar við fiskivinnusemju í millumtjóða samstarvi (undiryvirskrift)**

...

**Samandráttur um viðkomandi millumtjóða samstarv, sum Russland luttekur í (undiryvirskrift)**

...

## Kapittul 3: Havnaatgongd

Við løgtingslóg 90 frá 17. mai 2022 um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina, hevur landstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum í stóran mun heimild at seta tey tiltøk í verk, sum ES hevur

samtykkt móti Russlandi og Hvítarusslandi í kjalarvørrinum av russisku innrásini í Ukraina í februar 2022. Ein avmarking er kortini, at tað við broytingaruppskoti til løgtingslógina varð ásett, at "[t]iltøk sum kunnu ávirka fiskivinnuavtalur við onnur lond, ella sum avmarka útflutning av fiskavørum og matvørum kunna ikki setast í verk uttan við heimild í serstakari løgtingslóg". Í viðmerkingunum til broytingaruppskotið stendur, at tað "[...] avmarkar sostatt møguleikan fyri at seta møgulig tiltøk um havnastongsul fyri fiskiskip í verk, um hesi kunnu ávirka slíkar fiskiveiðiavtalur." Løgtingið gav sostatt ikki landstýrismanninum heimild til at gera átøk, sum kundu ávirka fiskiveiðuavtaluna millum Føroyar og Russland. (brot)

...

**Týdningurin av føroyskum havnum fyri russisk fiskiskip**

Løgtingslóg um sjófeingi hevur eitt yvirskipað bann fyri, at fremmand skip kunnu umskipa í føroyskum sjógvi og havnum. Tó kann landsstýrismaðurin loyva hesum og seta treytir. Lógarorðingin hevur verið at kalla óbroytt eini 4 áratíggju. Tó hava russisk skip fingið loyvi at fremja slíkar umskipingar. Russiskt virksemi í føroyskum sjóøki og í føroyskum havnum hevur sostatt hildið á leingi, og verður hugt eftir hagtølum fyri um- og uppskipingar hjá russiskum skipum í føroyskum havnum sæst, at Føroyar og føroyskar havnir eru grundleggjandi undirstøðukervi fyri russiska fiskiskapin í Norðuratlantshavi í síni heild, tí bróðurparturin av allari uppsjóvarveiðuni hjá russiskum skipum í Norðuratlantshavi verður umskipaður í føroyskum havnum.

Tann metti týdningurin av atgongd til føroyskar havnir er viðkomandi fyri at meta um, hvørjar avleiðingarnar kunnu hugsast at vera av ymiskum átøkum/inntrivum mótvegis russiskum virksemi í føroyskum havnum. (brot)

...

Russisk skip hava stórar nøgdir av svartkjafti, makreli, norðhavssild og partvíst eisini av kongafiski at fiska í Norðuratlantshavi um árið. Kvoturnar, sum Russland fær í sínámillum avtaluni við Føroyar at fiska í føroyskum sjóøki, eru bert ein brotpartur av samlaðu nøgdini, tí harumframt hevur Russland kvotur í Norðuratlantshavi umvegis NEAFC-samtyktir, umbýti við onnur lond enn Føroyar, og kvotur, sum Russland sjálvt hevur ásett sær, har semja ikki er í NEAFC.

Niðanfyri er eitt dømi við støði í tølum frá 2021, sum lýsir samlaðu kvotunøgdirnar hjá Russlandi samanborið við, hvussu nógv er um- og uppskipað av ávísu fiskasløgunum í føroyskum havnum. Russisku kvoturnar í 2021, russiska veiðan og um- og uppskipingar í føroyskum havnum

*Russisku kvoturnar í 2021, russiska veiðan og um- og uppskipingar í føroyskum havnum*

| | SVARTKJAFTUR | MAKRELUR | SILD | KONGAFISKUR |
|---|---|---|---|---|
| ÁSETTA KVOTAN[1][2] | 76.279 | 120.423 | 84.084 | 24.900 |
| ÚR FØROYUM | 82.000 | 14.500 | 10.000 | - |
| KVOTABÝTI VIÐ ONNUR LOND | 18.175 | 2.000 | - | - |
| **SAMANLAGT** | **176.454** | **136.923** | **94.084** | **24.900** |
| RUSSISKA VEIÐAN (NEAFC HAGTØL) | 162.989 | 136.207 | 92.843 | 21.936 |
| UM- OG UPPSKIPAÐ Í FØROYUM[3] | 159.000 | 122.000 | 68.000 | 6.000 |

[2] Sambært fráboðan, sum Russland hevur sent til NEAFC hesum viðvíkjandi (íroknað flytingar millum ár).





Tølini omanfyri vísa, at bróðurparturin av tí, sum russisk skip samanlagt fiska í Norðuratlantshavi av makreli, svartkjafti og norðhavssild, fer um ein føroyskan bryggjukant, áðrenn tað við farmaskipi fer víðari út í heim.

Tølini eru fyri 2021, fyri at vísa, at hetta eisini var støðan áðrenn 2022, og tølini eru tí ikki ein avleiðing av havnarstongslum í grannalondunum í kjalarvørrinum av russisku innrásini í Ukraina í februar 2022.

Nú flest øll lond í Evropa í stóran mun hava stongt sínar havnir, ella avmarkað atgongdina hjá russiskum fiskiskipum í havnirnar, eru føroysku havnirnar helst blivnar enn meiri umráðandi fyri Russland. Í 2022 var økt virksemi í mun til um- og uppskipingar av kongafiski úr Irmingerhavinum í føroyskum havnum, bæði í tali og í nøgd av umskipingum. Hetta er orsakað av, at tað síðani mars 2022 ikki hevur verið loyvt russiskum skipum at landa og umskipa kongafisk í íslendskum havnum, sum annars hevur verið vanligt.( brot)

**Týdningurin fyri Føroyar av russiskum virksemi í føroyskum havnum**

...

**Herða galdandi reglur um havnastongsul**

Kunngerðin um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina setur havnastongsul í verk fyri russisk skip í føroyskum havnum. Undantikin eru fiskiskip. Í § 1, stk. 2 í løgtingslógini um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina er ásett, at heimild er ikki fyri, at landsstýrismaðurin setur tiltøk í verk "sum kunnu ávirka fiskivinnuavtalur við onnur lond". (brot)

...

Noreg hevur síðani russisku innrásina sagt, at hóast samstarvið við Russland verður nógv skert, hevur tað stóran týdning at varðveita samstarvið við Russland um umsiting av felags fiskastovnum í Barentshavinum (brot)

...

Undan fiskiveiðusamráðingunum millum Noreg og Russland í oktober 2022 boðaði Noreg tó frá, at eftirlitið við russiskum fiskiskipum í norskum havnum fór at verða hert, samstundis sum atgongdin varð avmarkað til mest týðandi havnirnar í Norðurnoregi. (brot)

...

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, TAKS, VØRN, Arktisk Kommando og havnirnar samstarva um umsiting av reglunum um havnastongsul. (brot)

...

Fleiri av okkara grannalondum hava í teirra lóggávu heimild til at nokta skipum at koma í havn, tá talan er um virksemi, tengt at rættindum, sum ósemjur eru um. Í slíkum førum er ikki talan um avmarkingar, tegndar at ávísum flagglandi, men heldur avmarkingar av ávísum virksemi.

Veiðubann, sum eisini Føroyar taka undir við, er á triðja ári fyri veiðu eftir kongafiski í Irmingerhavinum. Russland hevur mótmælt NEAFC-samtyktini hesum viðvíkjandi og setir sær áhaldandi kvotu á sama støði sum undanfarin ár. ICES metir, at stovnurin er illa fyri.

Á NEAFC-ársfundinum í november 2022 varð samtykt um at banna skipum við veiðu av kongafiski úr Irmingerhavinum at umskipa í havnum í NEAFC-limalondum til viðgerðar. Bretland, ES og Ísland tóku undir við samtyktini. DFG og Noreg atkvøddu ikki, ímeðan Russland atkvøddi ímóti. Uppskotið varð samtykt, men Føroyar eru ikki bundnar av samtyktini í føroyskari havn ella í føroyskum sjóøki. (brot)

...

Ein avmarking í havnaatgongd fyri øðrum virksemi enn tí, sum er tongt at sínámillum fiskiveiðuavtaluni, hevði haft við sær munandi færri um- og uppskipingar í føroyskum havnum, tí áleið 60% av tí nøgd, sum í dag fer um føroyskan kaikant, er veiða hjá russiskum skipum, sum liggur uttanfyri avtaluna (brot)

...

Í sáttmálanum millum Noreg og Russland setti Russland m.a. inn soljóðandi tekst:

"Ved fisket i en kyststats økonomiske sone ligger havnene til denne staten nærmest fiskefelt og brukes av partenes fiskefartøy for å dekke behov knyttet til deres fiskevirksomhet. Derfor henger den bilaterale reguleringen av fiskeriene og adgang til partenes havner sammen. Den russiske part bemerker at begrensningene innført av Norge og som gjelder de russiske fiskefartøyenes adgang til å anløpe havner i Norge, gjør de russiske fiskefartøyenes virksomhet i Norges økonomiske sone vanskeligere, først og fremst sett i lys av at det er umulig å utføre nødvendig vedlikehold og reparasjoner i havner som ligger vesentlig nærmere fiskefelt enn russiske havner".

...

**Havnaeftirlit**

Føroyar hava umvegis økisbundnar fiskiveiðufelagsskapir og strandarlandaavtalur bundið seg til at hava eftirlit við landingum og um- og uppskipingum í føroyskum havnum hjá skipum undir fremmandum flaggi.

Sambært NEAFC-samtyktini um eftirlit hava NEAFC-limalondini skyldu til at hava eftirlit við 5 % av øllum landingum ella umskipingum av feskum fiski og 7,5 % av landingum ella umskipingum av frystum fiski í teirra havnum í einum ári. (brot)

...

**Tjekkpunkt**

Eitt tjekkpunkt er ásett stað, har fremmand skip sum koma í føroyskan sjógv ella fara úr føroyskum sjógvi, ella bæði, skulu sigla til. Endamálið við tjekkpunkti er at hava møguleikan fyri at eftirkanna, um tær fráboðanir, sum skipini geva um hvat er í lastini, t.d. tá skipið siglir heim, eru rættar. Neyðugt er ikki at liggja fyri skipunum og gera eftirlit á tjekkpunktinum hvørja ferð, men møguleikin fyri at eftirlitsskip er á staðnum, verður mett at hava ein fyribyrgjandi virknað, og økir um sannlíkindini fyri, at skip bera seg rætt at. (brot)

...

Krav er um, at føroysk skip skulu sigla til tjekkpunkt í russiskum sjógvi, tá komið verður í russiskan sjógv og farið verður úr russiskum sjógvi. Í ávísum førum liggja tjekkpunktini óhøgliga fyri, og hava Føroyar tí ynskt smidligari mannagongdir hesum viðvíkjandi, men uttan úrslit. Fyri nøkrum árum síðani settu Føroyar í sínámillum fiskiveiðuvavtaluna við Russland, at Føroyar umhugsa at seta tjekkpunkt fyri fremmand skip í føroyskum sjógvi (brot)

...

**Eygleiðarar umborð á fiskiskip**

At seta eygleiðarar umborð á fiskiskip er eitt væl kent eftirlitsamboð. Føroysk skip, sum fiska í russiskum sjógvi, hava eygleiðara frá russiska marknaðareftirlitinum (FSB) umborð, meðan skipið er til fiskiskap.

Føroyar hava í fleiri ár í sínámillum fiskiveiðuavtaluni við Russland víst á, at Føroyar møguliga fara at seta í verk eygleiðaraskipan í føroyskum sjógvi. (brot)

...

**Serøkið**

Í 1999 gjørdu Føroyar og Bretland eina marknasáttmála. Landgrunsmark er ásett í øllum økinum, har partarnir høvdu umskarandi landgrunskrøv. Tó er landgrunsmarkið ikki galdandi fyri alt sjóøkið omanfyri landgrunnin. Tað er nevniliga eitt sjóøki, ið nevnist "Serøkið", har Føroyar og Bretland hvør sær hava fullan myndugleika til m.a. at útskriva veiðuloyvi til skip undir triðjalandsflaggi. (brot)

...

**Tolleftirlit**

TAKS hevur tolleftirlit við russiskum skipum, sum koma inn um 12 fjórðingar og hevur eftirlit við, at kunngerðin um avmarkandi tiltøk verður hildin í sambandi við inn- og útflutning av vørum. Eitt av endamálunum við at seta tiltøk í verk móti Russlandi er, at landsstýrið vil tryggja, at Føroyar ikki verða brúktar at flyta vørur, sum eru ólógligar sambært galdandi tiltøkum og Føroyar harvið verða at rokna sum bakdyr fyri flutning til Russlands av hesum vørum. (brot)

...

Karmsáttmálin millum Føroyar og Russland um sínámillum fiskiskap frá 1977 ásetur, at partarnir møtast eina ferð um árið fyri at umrøða sínámillum samstarv. (brot)

...

Kvotan, sum verður latin Russlandi at fiska í føroyskum sjógvi er tongd at teimum nøgdum, sum Russland hevur at lata Føroyum í russiskum sjógvi, umframt sjálvsagt av, hvussu stovnarnir av svartkjafti, makreli og norðhavssild eru fyri. Seinastu 10 árini hevur kvotubýtið verið rættiliga støðugt, sum lýst í talvuni niðanfyri. (brot)

Kvotur í sínámillum veiðiavtalum Føroyar - Russland.

| | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Føroysk rættindi í russiskum sjógvi:** | | | | | | | | | | |
| Toskur | 20.500 | 19.500 | 19.500 | 19.330 | 16.800 | 15.690 | 15.690 | 17.690 | 15.356 | 12.285 |
| Hýsa | 1.800 | 1.800 | 2.000 | 1.800 | 1.680 | 1.569 | 1.569 | 1.769 | 1.343 | 1.276 |
| Flatfiskur | 900 | 900 | 900 | 900 | 900 | 900 | 900 | 900 | 900 | 900 |
| Rækjur | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 4.500 | 4.000 | 2.500 | 4.000 |
| **Russisk rættindi í føroyskum sjógvi:** | | | | | | | | | | |
| Svartkjaftur | 75.000 | 80.000 | 81.000 | 81.000 | 81.000 | 81.000 | 82.000 | 82.000 | 75.000 | 72.000 |
| Makrelur | 14.000 | 14.500 | 14.500 | 14.500 | 13.600 | 12.500 | 12.500 | 14.500 | 13.300 | 13.000 |
| Sild (hjáveiða) í mesta lagi | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 9.100 | 8.555 | 8.555 | 10.000 | 9.200 | 8.500 |
| Royndarveiða á djúpum vatni | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 |

Í kvotunøgd hevur Russland fingið í miðal 79.000 tons av svartkjafti, 13.700 tons av makreli og 9.400 tons av norðhavssild, umframt 500 tons royndarkvotu á djúpum sjógvi (dýpi 500-700 m) um árið.

...

## Kapittul 7: Avleiðingar fyri burðardygga umsiting av tilfeinginum og fyri atgongdina til rávøru

**Avleiðingar fyri møguleikarnar frameftir at tryggja eina burðardygga umsiting av tilfeingi í Norðurhøvum**

...

**Avleiðingar fyri atgongdina til rávøru hjá fiskavirkjum á landi**

...

**Tiltøk sum aftursvar upp á altjóðarættarlig brot**

Álopini og innrásin í Ukraina eru brot á grundleggjandi altjóðarættarreglur. Av tí at Russland er fastur limur í trygdarráði Sameindu Tjóða (ST), hevur ST avmarkaðar møguleikar í mun til brot, sum Russland fremur á ST-stovningarsáttmálan, eisini hóast talan er um krígsbrotsverk. ST-aðalfundurin hevur kortini fordømt russiska álopið, og Ukraina hevur kært Russland til altjóða dómstólin í Haag fyri brot á millumtjóðasáttmálan, ið áleggur øllum londum at forða fyri fólkamorðum.

Sum aftursvar upp á eyðsýndu brotini á grundleggjandi altjóðarættarreglur, hava Føroyar sett avmarkandi tiltøk í verk móti Russlandi. (brot)

...

Føroyar eru ikki bundnar at seta ES-tiltøk í verk móti Russlandi, men talan er um politiska avgerð, sum landsstýrið, við undirtøku frá Løgtinginum, hevur valt at seta í verk. Við at taka undir við ES og øðrum grannatjóðum, sum hava sett tiltøk í verk móti Russlandi, standa Føroyar saman við sínum sameindu. Samstundis eru Føroyar við til at verja grundleggjandi virði, sum føroyska samfelagið er grundað á, og sum skulu tryggja, at heimssamfelagið virkar eftir einum felags regluverki.

**Fleiri avmarkandi tiltøk setast í verk**

Síðani føroyska kunngerðin um avmarkandi tiltøk varð sett í verk í juni 2022, hevur ES samtykt fleiri sanksjónspakkar, sum hava til endamáls at leggja trýst á Russland at gevast við atgerðunum móti Ukraina.

Arbeitt verður við at dagføra avmarkandi tiltøkini móti Russlandi og Hvítarusslandi, soleiðis at føroysku tiltøkini í størst møguligan mun líkjast tiltøkunum, sum eitt nú ES hevur sett í verk. (brot)

...

Í 2014 settu ES og onnur lond tiltøk í verk móti Russlandi, sum aftursvar upp á ólógligu innlimanina av Krim í Russland. Russland svaraði aftur við at seta móttiltøk í verk, t.d. við at seta í verk forboð fyri innflutningi av mat- og fiskavørum úr ES. Tí hevur ikki borið til hjá ES og Noregi at útflyta fiskavørur til Russlands síðani august 2014. (brot)

...

## Kapittul 9: Samhandil við Russland síðan februar 2022

### Gongdin í samhandlinum millum Russland og onnur lond

Áðrenn 24. februar 2022 var Russland ein av størstu handilssamstarvspørtunum hjá ES.

Eftir russisku innrásina í Ukraina tann 24. februar 2022, hevur ES samtykt søguliga víðfevnd avmarkandi tiltøk við tí endamáli at niðurlaga grundarlagið undir russiska búskapinum og avmarka atgongdina til tøkni og marknaðir, og við hesum at ávirka førleikan hjá Russlandi at føra kríggj.

Ein avleiðing av russisku innrásini í Ukraina, er órógv á altjóða marknaðinum fyri mat- og landbúnaðarvørur, sum hevur elvt til hægri matvøruprísir um allan heim. Í sambandi við at ES hevur samtykt sanksjónir móti Russland, hava ríkis- og stjórnarleiðarar í ES tí lagt stóran dent á, at mat- og landbúnaðarvørur eru undantiknar og verða ikki raktar av sanksjónum.

Aðrar vørur, sum t.d. heilivágsvørur, verða heldur ikki raktar av tiltøkunum. Útflutningurin av matvørum úr ES til Russlands minkaði nógv longu í 2014, tá Russland setti innflutningsbann í verk fyri nógvar matvørur, heruppií fiskavørur, kjøtvørur, grønmeti, frukt og aðrar matvørur, sum aftursvar upp á ES-sanksjónirnar frá 2013, sum komu í kjalarvørrinum av russisku hertøkuni av Krim-hálvoynni.

Síðani februar 2022 er samhandilin millum ES og Russland sum heild minkaður nógv.[2] Kortini sæst í hagtølunum, at innflutningurin úr Russlandi er øktur í fleiri londum. Hetta kemst fyrst og fremst av, at brennievni er dýrkað nógv.

Eitt vegleiðandi yvirlit yvir broytingarnar í samhandlinum í tíðarskeiðinum mars til desember 2022, samanborið við 2021, sæst niðanfyri:

| Land | Prosentvis broyting i innflutningi úr Russlandi. Mars-des. 21 samanborið við mars-des. 22. | Prosentvis broyting i úflutningi til Russlands. Mars-des. 21 samanborið við mars-des. 22. |
|---|---|---|
| EU27 | 13% | -47% |
| Týskland | -4% | -55% |
| Danmark | -63% | -65% |
| Niðurlond | 5% | -54% |
| Bretland | -82% | -76% |
| Noreg | -30% | -44% |
| Ísland | -54% | -99% |
| Føroyar | -37% | -67% |

*Kelda: Hagstova Føroya*

Um útflutningurin fyri alt 2022 verður samanborin við alt 2021, sæst at føroyski útflutningurin til Russlands minkaði úr 2,3 milliardum í 2021 niður í 1 milliard í 2022. Í 2021 fór 23,1% av samlaða útflutninginum til Russlands, og í 2022 fóru 7,9% av samlaða útflutninginum til Russlands. Innflutningurin sama tíðarskeið

minkaði úr 132 milliónum í 2021 niður í 119 milliónir í 2022. Nevnast kann, at umframt at seta tiltøk í verk, hevur ES, saman við G7 londunum og øðrum samsintum pørtum, steðgað MFN-støðuni, sum hevur verið veitt Russlandi. Við hesum missir Russland týðandi fyrimunir á útflutningsmarknaðum, sum landið annars hevur havt sum limur í WTO. Samhandilin millum Føroyar og Russland Eftir russisku annekteringina av Krim í 2014 settu ES og EBS-londini sum áður nevnt tiltøk í verk móti Russlandi, sum svaraði aftur við at seta innflutningsbann í verk fyri matvørur úr hesum londunum, heruppií eisini fyri fiskavørur, sbr. omanfyri. Noreg, Ísland og ES, sum frammanundan útfluttu somu vørur, sum føroyskir útflytarar hava selt til Russlands, mistu við hesum atgongdina til russiska marknaðin. Síðani 2014 hevur føroyskur útflutningur tí havt eina serstøðu á russiska marknaðinum. (brot)

...

Í 2021 útfluttu Føroyar fyrst og fremst laks, makrel og sild til Russlands. Harumframt var nakað av útflutningi av svartkjafti, umframt smærri nøgdir av hummara og hvítingi. Tilsamans varð útflutt fyri 2,3 milliardir til Russlands í 2021. Til samanberingar varð útflutt fyri umleið 1 milliard til Russlands í 2022.

Nakað av laksi varð útflutt fyrstu tveir mánaðirnar í 2022, men frá mars til desember varð eingin laksur útfluttur til Russlands. Til samanberingar var laksurin umleið 38 % av samlaða útflutninginum til Russlands í 2021.

Frá mars til desember 2022 var sum heild stór minking í útflutninginum til Russlands. Eftir at makrelog sildafiskiskapurin tók seg upp aftur á heysti 2022, kvinkaði útflutningurin tó eitt sindur upp aftur, og nakað av vøkstri hevur verið í februar 2023, samanborið við februar 2022. Um útflutningurin av sild og makrel í 2022 verður samanborin við 2021, sær myndin soleiðis út:

Í 1.000 kr.

| Makrelur | Oktober | November | Desember |
|---|---|---|---|
| 2021 | 5.604,8 | 807,7 | 1.609,0 |
| 2022 | 5.459,7 | 412,5 | 5.400,4 |

| Sild | Oktober | November | Desember |
|---|---|---|---|
| 2021 | 1.544,7 | 15.127,0 | 19.405,2 |
| 2022 | 738,6 | 4.690,8 | 10.390,9 |

Sostatt var stór minking í útflutninginum allar mánaðirnar frá oktober til desember, burtursæð frá at meira varð útflutt av makreli í desember 2022 enn árið fyri. (brot)

...

Nakrir av stóru marknaðunum fyri makrel og sild eru Russland, Ukraina, baltisku londini, Pólland, Suðurkorea, Japan og Kina. Á hesum marknaðum kappast føroyskir útflytarar við úflytarar úr Íslandi, Noregi og ES. Ísland og Noreg hava longu tollframíhjárættindi á flestu av marknaðunum uttanfyri Russland umvegis EFTA-limaskapin og fríhandilssáttmálarnar, sum EFTA hevur við fleiri av londunum. Tað sama er galdandi fyri atgongdina hjá ES-londum til omanfyrinevnu marknaðir. (brot)

...

**Samandráttur um samhandilin við Russland síðani februar 2022**

Síðani februar 2022 er samhandilin millum ES og Russland sum heild minkaður nógv, hóast virðið á innflutningum úr Russlandi er økt í fleiri londum, orsakað av príshækkingunum fyri olju og gass í kjalarvørrinum av krígnum í Ukraina. Bæði ES og ST leggja dent á, at matvøruhandil ikki eigur at verða raktur av sanksjónum, serliga tí hetta er við til at dýrka og gera samhandilin truplari. Føroyski inn- og útflutningurin er minkaður meira enn í flestu evropeisku londunum, men hetta skal m.a. síggjast í ljósinum av, at matvørusamhandilin millum ES og Russland longu minkaði nógv í 2014. Kríggið og sanksjónir hava ávirkað pengaflytingar, og summir útflytarar hava av sínum eintingum steðgað útflutninginum, meðan aðrir útflytarar hava størri avbjóðingar við at finna nýggjar marknaðir. (brot)

...

## Kapittul 11: Stuðul til Ukraina

Fá átøk vísa betur í verki viljan at styðja Ukraina enn at lata landinum stuðul til at verja seg móti Russlandi, at veita bráðfeingishjálp og at byggja krígsrakt øki uppaftur. Sama hvørja avgerð landsstýrið tekur um fiskiveiðusamstarvið millum Føroyar og Russland, vil ein virknari leiklutur at stuðla Ukraina verða týdningarmikil fyri at vísa í verki støðu Føroya í mun til krígsførslu Russlands á Ukraina. Higartil eru lutfalsliga stórar upphæddir latnar av játtanini til neyðhjálp, heruppií eisini størsta einstaka upphædd, sum Føroyar hava latið. Í 2022 læt landsstýrið 2,75 mió. kr. og higartil í ár eru 7 mió. kr. latnar. Hóast upphæddirnar eftir føroyskum mátistokki kunnu tykjast lutfalsliga stórar, er talan um smáar upphæddir samanborið við tað, onnur lond um okkara leiðir hava latið Ukraina í stuðli. Í høvuðsheitum er føroyski stuðulin farin til flóttafólkastovnin hjá ST, UNCHR, sum virkar í Ukraina og grannalondum tess. Landsstýrið eigur at halda fram við at lata viðurkendum altjóða felagsskapum, sum virka í Ukraina og í grannalondum, stuðul, samstundis sum møguleikarnir fyri at lata til meira ítøkiligar verkætlanir, partaløg og samstørv eiga at kannast nærri.

Umframt at lata av neyðhjálparjáttanum, hava fleiri lond sett pening av beinleiðis til Ukraina, tí talan er um so stórar upphæddir, at tær høvdu skert aðrar neyðhjálparjáttanir munandi. Sum dømi kann nevnast, at Ísland í fíggjarlógini fyri 2023 hevur sett pengar av til Ukraina at verja seg fyri. Danska stjórnin hevur nýliga sett á stovn ein Ukraina-grunn. Ein serstøk játtan ella skipan fyri, hvussu landsstýrið meira miðvíst stuðlar Ukraina fíggjarliga eigur at verða tikin til viðgerðar í Føroyum. (brot)

...

Eisini hava lond flest lovað at partsfíggja lán, sum Heimsbankin letur Ukraina til endurbygging, og at lata fígging til grunnar, sum lond og felagsskapir – ofta í felag – hava stovnað til tess at fáa til vegar fígging til Ukraina. Átaka Føroyar sær meira virkið og miðvíst enn higartil at veita Ukraina styrk, fæst til vegar enn eitt haldgott dømi um, at Føroyar á føti við onnur lond um okkara leiðir stuðla Ukraina við eini røð av átøkum ella ítøkiligum verkætlanum. At miðla neyðhjálparátøk hevur týdning fyri umdømi Føroya í breiðum Public Diplomacy høpi, og vekir eisini ans millum tey lond, Føroyar samstarva við og hava áhuga í at menna samstarvið við. Fyri at skapa eitt betri yvirlit yvir tey átøk, sum Føroyar longu hava framt í sambandi við kríggið í Ukraina, eigur ein serstøk síða at gerast á government.fo og á føroysku heimasíðuni hjá UVMR, har tað í stuttum verður greitt frá fordøming, sanksjónum, neyðhjálp og stuðli, ukrainum, sum eru komnir til Føroya, og annað viðkomandi tilfar. (brot)

**Samandráttur um stuðul til Ukraina**

...

tað er sera átrokandi at taka upp spurningin um meira miðvíst at veita Ukraina stuðul, og eisini at økja um upphæddirnar, ið latnar verða, t.d. á serstakari játtan ella við eykajáttan. Hugt eigur at verða eftir ítøkiligum verkætlanum, partaløgum og samstørvum, ið hava strategiskan ella samfelagsligan týdning fyri Ukraina í strembanini eftir at verja seg og byggja landið uppaftur.

Samstundis eiga føroysku stuðulsátøkini miðvíst at verða miðlað (brot)

## Samandráttur

...

**Havnaatgongd**

Týdningurin av føroyskum havnum sum undirstøðukervi fyri virkseminum hjá russiskum skipum í Norðuratlantshavi er eyðsýndur, tí bróðurparturin av allari uppsjóvarveiðuni hjá russiskum skipum í Norðuratlantshavi verður um- og uppskipaður í føroyskum havnum. (brot)

...

Avmarkandi tiltøkini móti Russlandi og Hvítarusslandi eiga at verða dagførd, soleiðis at føroysku tiltøkini í størst møguligan mun líkjast tiltøkunum, sum eitt nú ES hevur sett í verk (brot)

...

**Samhandilin við Russland**

síðani februar 2022 Síðani februar 2022 er samhandilin millum ES og Russland sum heild minkaður nógv, hóast virðið á innflutningum úr Russlandi er økt í fleiri londum, orsakað av príshækkingunum fyri olju og gass í kjalarvørrinum av krígnum í Ukraina. Bæði ES og ST leggja dent á, at matvøruhandil ikki eigur at verða raktur av sanksjónum, serliga tí hetta er við til at dýrka og gera samhandilin truplari. Føroyski inn - og útflutningurin er minkaður meira enn í flestu evropeisku londunum, men hetta skal m.a. síggjast í ljósinum av, at matvørusamhandilin millum ES og Russland longu minkaði nógv í 2014. Kríggið og sanksjónir hava ávirkað pengaflytingar, og summir útflytarar hava av sínum eintingum steðgað útflutninginum, meðan aðrir útflytarar hava størri avbjóðingar við at finna nýggjar marknaðir. (brot)

...

Stuðul til Ukraina

...

Hugt eigur at verða eftir ítøkiligum verkætlanum,partaløgum og samstørvum, ið hava strategiskan ella samfelagsligan týdning fyri Ukraina í strembanini eftir at verja seg og byggja landið uppaftur. Samstundis eiga føroysku stuðulsátøkini miðvíst at verða miðlað (brot)

...